

VW PASSAT AUT — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: BP 247 Km: 143.000
Árgangur: 20.12.98 Seinast sýnaður: 17.02.05

Kr. 98.000,-



TOYOTA AYGO 1,0 PLUS 5D — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: PR 455 Km: 23.000
Árgangur: 15.03.06 Seinast sýnaður: 15.03.06

Kr. 122.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 D SOL SED — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: KF 437 Km: 130.000
Árgangur: 28.10.03

Kr. 195.000,-



PEUGEOT 106

Skrásetingarnr: TD 501 Km: 153.000
Árgangur: 06.01.98 Seinast sýnaður: 31.03.05

Kr. 30.000,-



TOYOTA COR. 1,6 LINEA TER. 5D H/B — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: LJ 887 Km: 99.500
Árgangur: 27.03.02 Seinast sýnaður: 22.06.06

Kr. 115.000,-



TOYOTA CAMRY 3,0 GL SEDAN AUT. — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: ER 235 Km: 94.000
Árgangur: 12.04.00 Seinast sýnaður: 09.11.05

Kr. 165.000,-



TOYOTA YARIS 1,0 H/B SOL 5H

Skrásetingarnr: UB 560 Km: 61.000
Árgangur: 24.04.02 Seinast sýnaður: 30.05.06

Kr. 82.000,-



MAZDA B- 2500

Skrásetingarnr: RH 427 Km:
Árgangur: 28.03.00 Seinast sýnaður: 27.11.06

Kr. 80.000,-



KIA CARNEVAL 2,9 — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: VS 473 Km: 102.000
Árgangur: 06.09.01 Seinast sýnaður: 14.04.05

Kr. 125.000,-



TOYOTA YARIS 1,3 H/B LUNA V/KOMF — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr: GE 927 Km: 45.000
Árgangur: 20.01.03

Kr. 105.000,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Simprentis 4,6 mió í nýggjum kapitali

**Framtaksgrunnur Føroya og Royndin saman við privatum íleggjarum hava sett 4,6 mió kr í partapeningi í Simprentis p/f, sum veitir skeið til oljuvinnuna**

KUNNINGARØKNI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Ólavur Ellefsen, stjóri í Simprentis er sera fegin um, at felagið nú hevur fingið kapital at arbeiða við. Hetta gevur okkum stórar møguleikar at selja skeið úti í heimi*

- Nýggi kapitalurin fer at styrkja um vakstrarmøguleikarnar hjá felagnum. Málið er at gerast ein av fremstu veitarunum av skeiðum til altjóða oljuvinnuna.

- Eg eri sera fegin um, at hendan loysnin endiliga er fingin upp á pláss, sigur Ólavur Ellefsen, stjóri í Simprentis, ikki sørt fegin, tá vit hittu hann í telefonini, beint áðrenn hann fór á skeið við Statoil-starvsfólkum í Stavanger í Noreg á middegi í dag.

Ólavur Ellefsen sigur, at tey nú hava sett fimm fólk í starv.

- Vit eru tveir í Havn, meðan tríggir eru á skrivstovuni í Aberdeen. Ein teirra er úr Venesuela, ein er føroyingur, sum lesur í Skotlandi og so Graeme Slaven, sum er kendur í Føroyum fyri samstarvið millum Handilsskúlan og Robert Gordon Universitetið í Aberdeen.

- Nú eru vit betur førir fyri at fara út at selja skeið. Hóast vit gjørdu tað nokso systematiskt í fjør, tá tríggir mans kundu liva av hesum, so gevur hetta okkum nógv betur møguleikar at arbeiða, sigur Ólavur Ellefsen.

Í fjør seldi Simprentis skeið í 12 londum, har fleiri enn fimmti tjóðskapir vórðu umboðaðir.

Simprentis selir og letur skeið, sum tey sjálvi gera. Simuleringar verða gjørdar í samstarvi við oljufeløgini – tað ger, at vit fáa røttu simuleringarnar, sigur Ólavur Ellefsen.

Nýggju íleggjararnir í Simprentis eiga um 40% av partapeninginum.

Í nevndini hjá Simprentis sita Ólavur Gregersen, formaður, Súsanna E. Sørensen, Christian Nagata og Rolf H. Olsen.

Áður hevur íbirtingarfelagið SET p/f gjørt íløgu í Simprentis p/f.

## FAKTA um Simprentis

Simprentis veitir skeið til altjóða olju- og gassídnaðin og útbúgvingarstovnar. Skeiðini eru grundað á teldusimuleringar, sum felagið hevur ment saman við olju- og gassfeløgum, við tí fyri eygað, at skeiðsluttakarar skulu royna seg og hava tað stuttligt fyri at læra sum mest. Navnið Simprentis er ein samanseting av orðunum "simulering" og "apprentice", sum merkir lærlingur.

# Enn møguleiki at tekna seg til Oljuráðstevnu

Hóast freistin at tekna seg til Oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum týsdagin, var úti í farnu viku, so er enn møguleiki at tekna seg sigur ein av høvuðsfyrireikarunum, Esther Dahl í Vinnuhúsinum. Hon heldur sjálv, at innihaldið á ráðstevnuni og bæði fjølbroytt og viðkomandi. - Vit taka aftur í aftur áhugaverdu boringina hjá Statoil seinasta heyst, og vit fáa eitt betri innlit í komandi boringina hjá BP. Høvi verður so eisini at frætta um komandi 3. Útbjóðing á landgrunninum. Eisini fara umboð fyri føroysku oljufeløgini og onnur oljurelaterað feløg at greiða frá. Haraftrat fáa vit so eisini høvi at hoyra, hvussu danir hava klárað seg sum veitarar til teirra oljuvinnu. Gestafyrilesarin hesaferð er Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, sum hevur fylgt oljutilgondini seinastu mongu árini sigur Esther Dahl, sum væntar sær eina góða ráðstevnu. Sjálv ráðstevnan verður sett av landsstýrismanninum í oljumálum, Bjarna Djurholm, týsmorgun kl. 9.40. Tað er Oljuvinnufelagið undir Vinnuhúsinum, sum skipar fyri hesi ráðstevnu, ið er vorðin ein fastur táttur á hvørjum ári og harvið eitt gott íkast til bæði orðaskiftið og upplýsingina rundan um eina framtíðar føroyska oljuvinnu.